KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 26.09.2019 kl. 17:30
**Málnr.:** 16/01208 Gerðabók
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen.
Varalimir: Kjartan á Gravarbø møtti fyri Óla M. Lassen
Ikki møtt:

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 108/19 | 19/01078-3 | Býráðslimur forfall - Óli M. Lassen |
| 109/19 | 18/00936-3 | Uppskot til navn/nøvn í útstykkingini á Fossum |
| 110/19 | 19/00881-1 | Økið omanfyri Faktorshúsini - uppskot til navn |
| 111/19 | 18/00726-9 | Leikvøllurin á Másheyggi - møgulig endurskoðan av navninum |
| 112/19 | 19/00880-1 | Uppskot til navn til urtagarðin við Klaksvíksveg 66 |
| 113/19 | 19/00541-7 | Samanlegging av matr.nr. 375 og 378 |
| 114/19 | 19/00839-2 | Marknaumskipan millum matr.nr. 1348f og 1348e |
| 115/19 | 19/00894-6 | Uppskot um makaskifti millum matr.nr. 660 og 659 |
| 116/19 | 19/00899-2 | Umsókn um sundurbýti og samanlegging - matr.nr. 530 og 528 |
| 117/19 | 17/00132-31 | Staðseting av skjótibreyt |
| 118/19 | 19/00642-8 | Atkoma til ávís neyst í Árnafirði |
| 119/19 | 19/00850-2 | Leigulendi til bygning hjá Sport 24 (matr.nr. 1186) |
| 120/19 | 19/00811-1 | Veitan av kloakk; miðstaðarøkið/Klaksvíksvegur – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 121/19 | 19/00069-68 | Flyting millum rakstrarstøð; Víðkan av Fjallafípuni – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 122/19 | 19/00700-6 | Umsókn um stuðul til jólaskip – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 123/19 | 13/00759-74 | Gøta framvið Nólsoyar Páls húsinum – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 124/19 | 19/00632-5 | Innrætting av Serdeildini á Skúlatrøð – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 125/19 | 19/00892-11 | Fíggjarætlan 2020, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2020 |

## 108/19
## 19/01078-3 Býráðslimur forfall - Óli M. Lassen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 108/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Óli M. Lassen, býráðslimur fyri Sjálvstýri, hevur boðað frá, at hann hevur lógligt forfall til býráðsfundin 26. sept. 2019. Jógvan Skorheim, borgarstjóri og býráðslimur á sama valevnislista, hevur boðað frá, at hann ynskir, at næstvaldi á listanum fær loyvi at taka sæti fyri Óla M. Lassen á fundinum vísandi til § 18 stk. 1, 1. punktum í Kommunustýrislógini.

**Lógargrundarlag:**
KSL § 18, stk. 1, 1. pkt.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til áheitanina frá Jógvani Skorheim um at innkalla tiltakslim fyri Óla M. Lassen.

### Klaksvíkar Býráð 26. september 2019
Einmælt samtykt at lata Kjartan á Gravarbø taka sæti fyri Óla M. Lassen.

## 109/19
## 18/00936-3 Uppskot til navn/nøvn í útstykkingini á Fossum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | K-26/19 |
| 2 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 70/19 |
| 3 Tekniska Nevnd | 18.09.2019 | K-32/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 109/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Heitt er á Gøtunavnanevndina um at koma við uppskotum til navn/nøvn til vegir í útstykkingini á Fossum. Á fundi 12-08-2019 hevur Gøtunavnanevndin soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevndir og býráð:

> Útstykking á Fossum – uppskot til navn/nøvn
> Skotið verður upp, at høvuðsvegurin inn í útstykkingina fær navnið **Fossabrúgv** eftir staðarnavni í økinum.
>
> Í samband við síðuvegirnar hellir nevndin til at uppkalla heiðafuglar og tekur viðgerðina av hesum partinum upp á seinni fundi.




**<u>Lógargrundarlag:</u>**
§3, stk.2 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur.

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
-

**<u>Tilmæli:</u>**
Vísandi til §28, stk. 5 og §41, stk.1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til viðgerðar og støðutakan.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019</u>**
Málið verið til kunningar.

**<u>Mentanarnevndin 17. september 2019</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-08-2019.

**<u>Tekniska Nevnd 18. september 2019</u>**
Málið verið til kunningar.

**<u>Klaksvíkar Býráð 26. september 2019</u>**
Tilmælið frá Mentanarnevndini 17. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 110/19
## 19/00881-1 Økið omanfyri Faktorshúsini - uppskot til navn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 72/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 110/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Á fundi 12-08-2019 hevur Gøtunavnanevndin soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevndir og býráð:

> Økið omanfyri Faktorshúsini
> Í samband við at tað í økinum omanfyri Faktorshúsini verður arbeitt við standmynd av listakvinnuni Elinborg Lützen, mælir nevndin til at navngeva økið og skjýtur í hesum sambandi upp navnið: **Klaksvíkstrøð** hetta tí, at økið er partur av upprunaligu Klaksvíkstrøðni, og er tað seinasta grøna, ið eftir er av trøðni.




**Tilmæli:**
Vísandi til §28, stk. 5 og §41, stk.1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til viðgerðar og støðutakan.

**Mentanarnevndin 17. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-08-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá Mentanarnevndini 17. sept. 2019 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 111/19
## 18/00726-9 Leikvøllurin á Másheyggi - møgulig endurskoðan av navninum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 67/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 111/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Nú Klaksvíkar Býráð hevur samtykt at navngeva síðuvegin úr Gerðagøtu ***við Másheyg***, hevur Gøtunavnanevndin á fundi 12-08-2019 endur-umrøtt navnið *Leikvøllurin á Másheyggi* og hevur soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevndir og býráð:

> Endurskoðan av navninum Leikvøllurin á Másheyggi
> Í upprunaviðgerðini ynskti nevndin navnið Másheygur varðveitt í økinum, og var hetta grundgevingin fyri tilmæli nevndarinnar um navnið "Leikvøllurin á Másheyggi". – Nú síðuvegurin úr Gerðagøtu hevur fingið navnið **við Másheyg**, hellir nevndin til at finna annað navn til nýggja leikvøllin.
> Í hesum sambandi er navnið **Kjølbreyt** nevnt - (sprottið út frá orðinum breyt (rennibreyt v.m.) undir Kjølinum).
>
> Nevndin sær uppskotið sum snøgt og vælhóskandi, og mælir mentanarnevndini til at umrøða málið av nýggjum.




**Tilmæli:**
Vísandi til §28, stk. 5 og §41, stk.1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til viðgerðar og støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 17. september 2019</u>**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Beinta Klakstein og Gunvá við Keldu, tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-08-2019.
Kristian Eli Zachariasen og Atli S. Justinussen taka støðu í býráðnum.

**<u>Klaksvíkar Býráð 26. september 2019</u>**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í MeN 17. sept. 2019; tað fall við 4 atkvøðum fyri (SVJ, BK, GvK og SOJ) og 7 atkvøðum ímóti (JS, TJL, KEZ, KáG, ASJ, BJ og HJS).
Sostatt verður navnið *Leikvøllurin á Másheyggi* varðveitt.

## <u>112/19</u>
## <u>19/00880-1 Uppskot til navn til urtagarðin við Klaksvíksveg 66</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | K-27/19 |
| 2 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 71/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 112/19 |

**<u>Frágreiðing um málið:</u>**
Á fundi 12-08-2019 hevur Gøtunavnanevndin soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevndir og býráð:

> <u>Urtagarðurin við Klaksvíksveg 66</u>
> Urtagarðurin hoyrdi til húsini, sum vóru kallað á Bakkanum. Nevndin skjýtur tí upp at navngeva urtagarðin: **á Bakkanum**



**Tilmæli:**
Vísandi til §28, stk. 5 og §41, stk.1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til viðgerðar og støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Málið verið til kunningar.

**Mentanarnevndin 17. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-08-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá MeN 17. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 113/19
## 19/00541-7 Samanlegging av matr.nr. 375 og 378

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 102/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 113/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Í tráð við býráðssamtykt frá 29.05.2019 varð fundur millum borgaran og umboð fyri Teknisku Fyristing tann 29. juni 2019. Niðurstøðan á fundinum varð, at borgarin ikki er áhugaður í makaskifti, men heldur fast við umsóktu samanlegging av ognum sínum - matr.nr. 375 og 378

Út frá omanfyri nevndu niðurstøðu verður umsóknin um samanlegging nú send Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Málið tikið til eftirtektar.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið, dagf. 9. aug. 2019, einmælt samtykt.

## 114/19
## 19/00839-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 1348f og 1348e

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 105/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 114/19 |

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til viðheftu umsókn um marknaumskipan millum omanfyri nevndu matriklar. Matr.nr. 1348f er í dag 636 m$^2$, og umskipanin snýr seg um, at uml. 30 m$^2$ verða fluttir frá matr.nr. 1348f til matr.nr. 1348e.




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umskipanini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-08-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá UBN 16. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 115/19
## 19/00894-6 Uppskot um makaskifti millum matr.nr. 660 og 659

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 16.09.2019 | 26/19 |

| | | |
|---|---|---|
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 106/19 |
| 3 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 73/19 |
| 4 Tekniska Nevnd | 18.09.2019 | 52/19 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 115/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Matr.nr. 660 eigur uml. 18 $m^2$ út í Nýggjaveg. Tekniska Fyrisiting staðfestir, at hesir 18 $m^2$ frammanfyri húsini illa kunnu brúkast til parkering orsakað av frástøðuni til vegamót.

Eigarin bjóðar nú kommununi at yvirtaka hesar 18 $m^2$ (litað orange á kortinum), um hon afturfyri fær ein geira uppá uml. 2,5 metrar framvið norðurmarkinum til parkering (uml. 43 $m^2$ av økinum hjá Klubbanum).

Økið hjá Klubbanum er frammanundan ikki stórt, og metir Tekniska Fyrisiting tí ikki býtið 18 $m^2$ fyri 43 $m^2$ vera realistiskt, men sær fyri sær ein møguleika við reinum makaskifti – tvs. matr.nr. 660 letur 18 $m^2$ til vegin, og afturfyri fær tilsvarandi 18 $m^2$ burturav økinum hjá Klubbanum. (matr.nr. 659).

Mentanardeildin tekur undir við makaskiftinum, treytað av at servituttur verður tinglisin á økið frá Klubbaognini um, at økið bert bert kann brúkast til parkering av skrásettum bili – ikki til bygging ella goymsluøki.



Uppskot 1: Breidd 2,5 m frá matr.nr. 659 til 660




Uppskot 2: Breidd 1 m frá matr.nr. 659 til 660

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Onki peningaligt endurgjald - uppleggið er fermetur fyri fermetur

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting biður um heimild til

- at avgreiða málið við reinum makaskifti,
- at avtala við eigaran hvørt makaskiftið skal fremjast sambært uppskoti 1 ella 2 og
- at tinglesa servitutt um parkering á aktuella økið

**Ferðslunevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-09-2019.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við FeN, 16-09-2019.

**Mentanarnevndin 17. september 2019**
Nevndin tekur undir við FeN og UBN 16-09-2019.

**Tekniska Nevnd 18. september 2019**
Nevndin tekur undir við FeN og UBN 16-09-2019 og MeN 17-09-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá TN 18. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 116/19
## 19/00899-2 Umsókn um sundurbýti og samanlegging - matr.nr. 530 og 528

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 107/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 116/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Eigararnir av matr.nr. 530 og 528 søkja um loyvi til sundurbýti og samanlegging, soleiðis at uml. 142 m$^2$ verða fluttir frá matr.nr. 530 til matr.nr. 528. Eftir umskipanina verða matr.nr. 530 og 528 ávikavist uml. 658 og 611 m$^2$. Umsóknin er í tráð við áseting byggisamtyktarinnar.




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-08-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá UBN 16. sept. 2019 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 117/19
## 17/00132-31 Staðseting av skjótibreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.09.2019 | 65/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 95/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 117/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Í tilmælinum frá umsitingini, dagfest 14. aug. 2019, verður sagt, at í fleiri umførum hevur staðseting av skjótibreyt í Klaksvíkar kommunu verið umrødd. Ynskið hjá skjótiáhugaðum í Klaksvík er ein breyt til greinina "Skeet". Arbeitt hevur verið við fleiri ymiskum staðsetingum. Á fundi 19. juni millum borgarstjóran, vinnu- og mentanarstjóran og ein av eldsálunum handan verkætlanina við skjótibreyt, varð staðseting úti á Bumshamri, har nógv er fylt upp nú, umrødd.

Viðurskiftini á staðnum eru kannað, og hóast økið í løtuni er í ymiskum hæddum á ein slíkan hátt, at nakað av arbeiði skal gerast fyri at fáa eina fløtu, sum er væl egnað til skjótibreyt, so verður mett, um ikki óvæntað viðurskifti stinga seg upp, at tað kann bera til at staðseta skjótibreyt í økinum. Økið er nakað burtur frá búseting og sæst ikki úr býnum, og kommunan eigur lendið.

Sí annars skrivið frá umsitingini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin avseting er til fyrireiking av skjótibreyt

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við staðseting av skjótibreyt á Bumshamri, men at leggja málið fyri nevndirnar aftur, áðrenn endalig støða verður tikin til hesa staðseting.
Mælt verður somuleiðis til, at avvarðandi nevndir taka prinsipiella støðu til, hvørt kommunan eigur at virka fyri skjótibreyt, hvørt kommunan skal gera økið klárt, ella um kommunan eisini eigur at rinda fyri sjálva skjótibreytina.

**Mentanarnevndin 17. september 2019**
Nevndin mælir til at áseta staðsetingina (á Bumshamri) og at vent verður aftur til nevndina við útgerð og kostnaði, hetta soleiðis at peningurin kann setast av á fíggjarætlanini fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Nevndin tekur undir við MeN 17-09-2019 og staðfestir, at partur kommununnar er lendisarbeiðið.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá FíN 24. sept. 2019 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 118/19
## 19/00642-8 Atkoma til ávís neyst í Árnafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 16.09.2019 | 46/19 |
| 2 Árnafjarðarnevndin | 18.09.2019 | 11/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 118/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Sí skriv frá umsitingini, dagf. 12. sept. 2019, ið m.a. greiðir soleiðis frá:
Fyrr í ár fekk kommunan umsókn frá eigarum um møguleika at gera úthurð á langsíðu á neysti í Árnafirði heldur enn omanfyri við tílvísing til, at talan er um sunnasta neystið av teimum 7, og tey tí ikki hava granna á aðrari síðuni. Síðan eru fleiri umsóknir komnar um at gera úthurðina á sama hátt.

Grundleggjandi er talan um vanligt byggimál, men av tí at talan er um neyst og tað samstundis er talan um at geva ávísum neystaeigarum ein møguleika, sum aðrir neystaeigarar í sama lutakasti ikki hava møguleika fyri, umframt at talan er um havna- og vinnuøkið, verður málið eftir áheitan frá nevndarformanninum lagt fyri Havna- og vinnunevndina til viðgerðar.

Neystaeigararnir greiða í umsóknini frá, at teir fáa betri atkomu til síni neyst við hesi loysn og at teir ikki duga at síggja vansar við hesi ætlan. Hartil greiða umsøkjararnir frá, at neystaeigararnir, sum ikki hava sama møguleika, stuðla umsøkjarunum í hesi ætlan.

Umsitingin skal tó vísa á, at hetta at síggja til gevur hesum trimum neystaeigarunum betri møguleikar at innrætta seg, at talan tykist vera um eitt sterkt ynski og skal úthurð vera á langsíðuni, er talan um eina góða og snøgga loysn, sum umsøkjararnir eru komnir við.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at viðkomandi nevndir taka støðu til málið.

**Havna- og Vinnunevndin 16. september 2019**
Málið verður beint í býráðið, men áðrenn tað verður málið viðgjørt í Árnafjaranevndini.

**Árnafjarðarnevndin 18. september 2019**
Nevndin mælir til at ganga umsøkjarunum á møti, og mælir samstundis til, at skunda verður undir málið at fremja parkeringspláss norðan fyri heimaru neystini, og omanfyri verandi neyst uttan fyri kirkjugarðin.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Atkvøtt varð um tilmælið frá ÁrN 18. sept.; tað fall við 5 atkvøðum fyri (GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ) og 6 atkvøðum ímóti (JS, SVJ, TJL, KEZ, KáG og BK).

Síðani varð atkvøtt um at beina málið aftur í umsitingina at skipa fyri formligari grannahoyring, áðrenn málið fer víðari í UBN; tað varð samtykt við 5 atkvøðum fyri (JS, TJL, KEZ, KáG og BK), 2 atkvøðum ímóti (ASJ og SOJ) og 4 blokum atkvøðum (SVJ, GvK, BJ og HJS).

## 119/19
## 19/00850-2 Leigulendi til bygning hjá Sport 24 (matr.nr. 1186)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 115/19 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 16.09.2019 | 44/19 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 96/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 119/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 13. aug. 2019, ið m.a. greiðir frá, at ítróttarhandilin Sport 24 í longri tíð hevur sóknast eftir einum øki til umskipingar- og goymslubygning í Klaksvík. Tó hevur verið sera torført at vísa á eitt hóskandi lendi. Á fundi millum kommununa og Sport 24 varð funnið fram til, at ein møguleiki kundi verið at brúka ein part av matr.nr. 1186 til bygningina. Áður hava fyrispurningar verið frá øðrum pørtum um hetta øki, men í løtuni er ongin annar fyrispurningur um júst hetta lendi.

Talan er um økið A10, sum er lagt út til blandað íbúðar- og vinnuøki, og heimild er til at byggja á 50% av stykkinum. Her verður talan um vinnubygging, sum dømi eru um í økinum.




**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein árlig leiguinntøka fyri lendið.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndirnar og býráðið taka støðu til, um økið skal leigast til Sport 24 við einum leigusáttmála uppá 29 ár og 11 mánaðir, tó at leigusáttmálin av sær sjálvum fer úr gildi, um liðugur bygningur ikki stendur á økinum innan eitt ár eftir, at leigusáttmálin er undirskrivaður.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-08-2019; nevndin mælir tó til, at byggingin skal verða liðug innan tvey ár.

**Havna- og Vinnunevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 16-09-2019.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Nevndin tekur undir við HaVN 16-09-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá FíN 24. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 120/19
## 19/00811-1 Veitan av kloakk; miðstaðarøkið/Klaksvíksvegur – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 16.09.2019 | 96/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 91/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 120/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 11. juli 2019 verður greitt frá, at í samband við arbeiði í miðbýarøkinum hevur ein kloakktrupulleiki stungið seg upp, sum má loysast. Neyðugt verður at binda gomlu kloakkina í eina pumpuskipan, sum verður íbundin spillivatnsútleiðingina.

**Lógargrundarlag:**
Sambært spillivatnsætlan kommununar frá 2010.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 150.000.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til, at ein pumpubrunnur verður staðsettur á økinum millum Føroya Bjór og sjóhitamiðstøðina, so avbjóðingarnar í økinum verða loystar.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Alt hetta arbeiðið verður mett at kosta 150.000 kr. og má fíggjast av *Miðbýur, íløga*, tí hetta er partur av miðbýarætlanini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. september 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-07-2019.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 16-09-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá FíN 24. sept. 2019 einmælt samtykt.

## 121/19
## 19/00069-68 Flyting millum rakstrarstøð; Víðkan av Fjallafípuni – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 17.09.2019 | 44/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 99/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 121/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 17. juli 2019, har m.a. greitt verður frá, at Gerðastova við 16 barnagarðsplássum í summar verður niðurløgd. Samstundis verður Fjallafípan útbygd við einum bygningi til 26 barnagarðspláss, sostatt kunnu pengar flytast millum rakstrarstøðini *Mylnuhúsið – Fjallafípan* til ein part av meirrakstrinum í Fjallafípuni vegna økt barnatal.

**Lógargrundarlag:**
Dagstovnalógin ásetur, at tað er ábyrgd kommununnar at útvega tilboð um barnaansing í nøktandi kørmum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Flyting frá Mylnuhúsinum til Fjallafípuna verður at fremja soleiðis:

| **Kontunr.** | **Kontuheiti** | **16 pláss í 4 mðr.** | **Samanteljingar** |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | **Lønarútreiðslur** | | |
| 111030 | Pedagoglønir | 219.904 kr | |
| 111032 | Hjálparfólkalønir | 74.837 kr | |
| 111000 | Til ymiskt, 1.085 kr. pr. barn | 5.787 kr | |
| 111200 | Tímalønir | 9.205 kr | |
| 111250 | Reingerðarlønir | 18.133 kr | **327.866 kr** |
| | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| 141000 | Ferðing og flutningur innanlands | 2.128 kr | |
| 142000 | Umboðan | 315 kr | |
| 143000 | Matur og drykkjuvørur | 8.533 kr | |
| 144100 | Orkukeyp - El | 1.547 kr | |
| 144200 | Oljunýtsla | 4.651 kr | |
| 1469xx | Keyp av vørum annars | 1.397 kr | |
| 146940 | Tilfar til dagdvølju | 4.923 kr | |
| 146915 | Reinførisvørur | 1.931 kr | |
| 146920 | Skrivstovuhald | 405 kr | |
| 146925 | EDV-tól o.a. | 1.083 kr | |
| 154027 | Størri innbúgv - yvir 15-túsund | 3.947 kr | |
| 147211 | Roknskaparhjálp | 3.947 kr | |
| 147902 | Útbúgving | 2.880 kr | |
| 751000 | MVG | 7.440 kr | **45.127 kr** |
| | | | |
| | **Húsaútreiðslur** | | |
| | Húsaleiga | 16.000 kr | |
| 146962 | Umsiting av húsum | 2.667 kr | **18.667 kr** |
| | | | |
| | **Útreiðslur íalt** | | **391.660 kr** |
| | | | |
| | **Inntøkur** | | |
| 217030 | Gjald frá foreldrum | -71.616 kr | **-71.616 kr** |
| | | | |
| | **Rakstrarútreiðslur netto** | | **320.044 kr** |

**<u>Tilmæli:</u>**
Mælt verður til at flyta 320.000 kr millum rakstrarstøðini Mylnuhúsið – Fjallafípan, sum sett upp í fíggjarligum avleiðingum.
Somuleiðis verður mælt til at veitt verður eykajáttan á 200.000 kr til fígging av 10 nýggjum barnagarðsplássum í Fjallafípuni.
Talan er í báðum førum um rakstur svarandi til fýra teir seinastu mánaðirnar í 2019

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. september 2019**
Ein meiriluti í nevndini, Beinta Klakstein, Signhild V. Joensen og Tummas J. Lervig, tekur undir við tilmælinum.
Ein minniluti í nevndini, Gunvá við Keldu og Herfrí Sørensen, tekur undir við tilmælinum, men at tilmælta eykajáttanin á 200.000 kr. ístaðin verður flutt millum kontur frá barnaansing felags.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Ein meiriluti, JS, SVJ og TJL, tekur undir við meirilutanum í B&U 17-09-2019.
Ein minniluti, GvK og HJS, tekur undir við minnilutanum í B&U 17-09-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 24-09-2019; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, KáG, BK), 5 atkvøðum í móti (GvK, ASJ, BJ, HJS, SOJ) og 0 blonkum atkvøðum.

## 122/19
## 19/00700-6 Umsókn um stuðul til jólaskip – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.06.2019 | 82/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 01.07.2019 | 102/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 26.09.2019 | 122/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 1. juli 2019.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 19-06-2019.

**Klaksvíkar Býráð 1. juli 2019**
Tilmælið frá FíN 25-06-2019 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá BýR 1. juli 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 123/19
## 13/00759-74 Gøta framvið Nólsoyar Páls húsinum – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.06.2019 | 50/19 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.06.2019 | 85/19 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.06.2019 | 71/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 01.07.2019 | 101/19 |
| 5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 26.09.2019 | 123/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 1. juli 2019.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. juni 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-06-2019, og heitir á umsitingina at treyta sær, at almennu reglurnar um atkomu verða fylgdar.

**Mentanarnevndin 18. juni 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 17-06-2019.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2019**
Nevndin tekur undir við MeN 18-06-2019.

**Klaksvíkar Býráð 1. juli 2019**
Tilmælið frá FíN 25-06-2019 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá BýR 1. juli 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 124/19
## 19/00632-5 Innrætting av Serdeildini á Skúlatrøð – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 19.06.2019 | 41/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.06.2019 | 79/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 01.07.2019 | 100/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 26.09.2019 | 124/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 1. juli 2019.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. juni 2019**
Vísandi til tilmælið, dagf. 05-06-2019, mælir nevndin til at fremja málið fyri metta kostnaðin á 1.150.000 kr., og heitir á fíggjarnevndina um at taka málið upp um fígging av hesum eykakostnaði, soleiðis at serskúlin fær innivist á Skúlatrøð frá og við komandi skúlaári.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2019**
Nevndin tekur undir við B&U 19-06-2019 og mælir til, at peningurin verður tikin av *tøkum peningi*.

**Klaksvíkar Býráð 1. juli 2019**
Tilmælið frá FíN25-06-2019 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá BýR 1. juli 2019 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 125/19
## 19/00892-11 Fíggjarætlan 2020, Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 83/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 125/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Niðanfyri standandi talva er ein uppgerð yvir høvuðstølini til fyrsta uppskot til viðgerð av fíggjarkarminum 2020 hjá Klaksvíkar kommunu. Uppgerðin byggir á eina meting um raksturin fyri 2019, eina framskriving av tí sáttmálabundna lønarvøkstrinum og somuleiðis ein meting um inntøkurnar fyri 2020.

Fíggjarætlanin 2020 hjá NBH er partur av útreiðslunum undir §2 Almanna- og heilsumál. Og er parturin hjá Klaksvíkar kommunu 62,1 mió.kr.

Í samband við lønarframskrivingarnar eru lønirnar hjá Klaksvíkar kommunu framskrivaðar við 2%. Hjá NBH eru lønirnar framskrivaðar við 4%.

**Fíggjarkarmur 2020**

| Klaksvíkar kommuna | Roknsk. | F.ætlan I | Eyka-játtanir | F.ætlan III | Meir minni Nýtsla | Meting Roknsk | Inntøku/ lønar farmskr. | Aðrar Inntøkur/ útreiðslur | Fíggjar-karmur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **mió.kr.** | **2018** | **2019** | **2019** | **2019** | **2019** | **2019** | **2020** | **2020** | **2020** |
| Inntøkur | -271.692 | -270.000 | 0 | -270.000 | -12.791 | -282.791 | -5.709 | | -288.500 |
| Rakstrarútreiðslur | 198.973 | 195.900 | 791 | 196.691 | 5.877 | 202.568 | 4.266 | | 206.834 |
| **Rakstraravlop** | **-72.720** | **-74.100** | **791** | **-73.309** | **-6.914** | **-80.223** | **-1.443** | | **-81.666** |
| Rentustuðul | 3.648 | 3.600 | 0 | 3.600 | -35 | 3.565 | 35 | | 3.600 |
| Rentuútreiðslur | 6.315 | 4.000 | 0 | 4.000 | -1.201 | 2.799 | 601 | | 3.400 |
| **Rakstrarútreiðslur í alt** | **208.936** | **203.500** | **791** | **204.291** | **4.640** | **208.931** | **4.903** | **0** | **213.834** |
| **Rakstrarúrslit** | **-62.756** | **-66.500** | **791** | **-65.709** | **-8.151** | **-73.860** | **-806** | **0** | **-74.666** |
| **Íløgur** | **75.864** | **66.500** | **-93.900** | **160.400** | **-63.600** | **96.800** | | | |
| **RLÙ** | **13.107** | **0** | | **94.691** | | **22.940** | | | |

Í uppruna fíggjarætlanini varð rakstraravlopið mett til 74,1 mió.kr., og rakstrarúrslitið 66,5 mió.kr. Gjørd er ein meting av roknskapinum fyri 2019. Henda meting vísir, at rakstraravlopið verður umleið 80,2 mió.kr og eitt rakstrarúrslit á 73,9 mió.kr.

Samanborið við dagførdu fíggjarætlanina 2019 vísir metingin, at rakstrarúrslitið er 8,2 mió.kr. betri. Hendan betring stavar frá meirinntøkum á 12,7 mió.kr., og 1,2 mió.kr. lægri rentútreiðslur enn avsett í fíggjarætlanini. Á hini síðuni eru rakstrarútreiðslurnar 5,9 mió.kr. hægri enn avsett í dagførdu fíggjarætlanini.

**Inntøkur**

| | Inntøkur | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Inntøkur | Roknsk. | Meting Roknsk. | F.ætlan |
| | 1.000 kr | 2018 | 2019 | 2020 |
| | Kommunuskattur | -202.310 | -215.000 | -220.000 |
| | Húsaleiguskattur | -154 | -124 | 0 |
| | Felagsskattur | -21.097 | -16.515 | -16.500 |
| | Skattur av eftirlønargjøldu | -36.749 | -40.000 | -41.000 |
| | Flyting vegna DIS, FAS og fr | -11.381 | -11.152 | -11.000 |
| | Inntøkur tilsamans | -271.692 | -282.791 | -288.500 |

Á frammanfyri standandi talvu er eitt yvirlit yvir inntøkurnar. Metingin er, at inntøkurnar í ár verða umleið 283 mió.kr.
Persónskatturin verður mettur til at verða umleið 215 mió.kr. í 2019. Hetta svarar til ein vøkstur á umleið 6%. Tað er altíð ein ávís óvissa í samband við reguleringina av persónsskattinum. Tí skal hædd takast fyri hesum.
Felagsskatturin verður mettur til 16,5 mió.kr. samanborið við 21 mió. kr. í 2018. Tað er eitt sindur trupult at meta um felagsskattin. Vit hava ikki fingið uppgerðina frá TAKS. Mett verður, at í meira "vanligum tíðum" vildi felagsskatturin verið umleið 15 mió.kr. +/- 2 mió. kr. Tí er valt at seta 16,5 mió.kr. í fíggjarkarmin 2020.
Forskattingin av pensjónsinngjaldingum verður mett til umleið 40 mió.kr. í ár. FMR hevur gjørt eina framskriving, har mett verður, at upphæddin verður á sama støði. Avsett er 41 mió.kr. í 2020. Afturbering í samband við FAS v.m. er rímuliga støðug, millum 10-12 mió.kr. Tí verður roknað við 11 mió.kr. í 2020.
Samanlagt verða inntøkurnar 288,5 mió.kr. svarandi til ein samlaðan vøkstur á umleið 4%.

**Útreiðslur**
Í uppruna fíggjarætlanini 2019 vórðu samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til 195,9 mió.kr. Eykajáttanir í rakstrinum hava í árinum verið 791 t.kr., soleiðis at dagførda fíggjarætlanin 2019 er 196,7 mió.kr.
Tann seinasta metingin um raksturin fyri 2019 er, at rakstrarútreiðslurnar verða 5,8 mió.kr. hægri ella tilsamans 202,6 mió.kr, men hevur hetta serligar orsøkir.

**KLAKSVÍKAR KOMMUNA** Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| Klaksvíkar kommuna | | Fíggjarætlan 2020 | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Roknsk. | F.ætlan I | Eyka-játtanir | F.ætlan III | Meir/ minni nýtsla | Meting Roknsk. | Lønar fram-skrivingar | Aðrar útreiðslur/ inntøkur | F.ætlan I | 2019 I 2020 I | 2019 III 2020 I |
| | 1.000 kr | 2018 | 2019 | 2019 | 2019 | 2019 | 2019 | 2020 | 2020 | 2020 | 2019 | 2019 |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 21.861 | 21.880 | 0 | 21.880 | 445 | 22.325 | 329 | 0 | 22.654 | 774 | 774 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 73.393 | 75.793 | 439 | 76.232 | 749 | 76.981 | 2.531 | 0 | 79.511 | 3.718 | 3.279 |
| §3 | Børn og ung | 41.498 | 42.295 | 581 | 42.876 | 1.403 | 44.279 | 806 | 0 | 45.085 | 2.790 | 2.209 |
| §4 | Útbúgving og gransking | 9.780 | 9.695 | -364 | 9.331 | 134 | 9.465 | 33 | 0 | 9.497 | -198 | 166 |
| §5 | Mentan og frítíð | 16.242 | 12.660 | 135 | 12.795 | 861 | 13.656 | 134 | 0 | 13.790 | 1.130 | 995 |
| §6 | Teknisk mál | 20.821 | 20.991 | 0 | 20.991 | 618 | 21.609 | 370 | 0 | 21.979 | 988 | 988 |
| §7 | Kommunalt virki | 15.376 | 12.586 | 0 | 12.586 | 1.668 | 14.254 | 64 | 0 | 14.318 | 1.732 | 1.732 |
| | **Rakstrarútreiðslur** | **198.973** | **195.900** | **791** | **196.691** | **5.877** | **202.568** | **4.266** | **0** | **206.834** | **10.934** | **10.143** |
| | Rentustuðul | 3.648 | 3.600 | 0 | 3.600 | -35 | 3.565 | 35 | | 3.600 | 0 | 0 |
| | Rentuútreiðslur | 6.315 | 4.000 | 0 | 4.000 | -1.201 | 2.799 | 601 | | 3.400 | -600 | -600 |
| | **Rakstrarútreiðslur í alt** | **208.936** | **203.500** | **791** | **204.291** | **4.640** | **208.931** | **4.903** | **0** | **213.834** | **10.334** | **9.543** |
| | **Inntøkur** | **-271.692** | **-270.000** | **0** | **-270.000** | **-12.791** | **-282.791** | **-5.709** | | **-288.500** | **-18.500** | **-18.500** |
| | **Rakstrarúrslit** | **-62.756** | **-66.500** | **791** | **-65.709** | **-8.151** | **-73.860** | **-806** | **0** | **-74.666** | **-8.166** | **-8.957** |
| | **Íløgur** | **75.864** | **66.500** | **-93.900** | **160.400** | **-63.600** | **96.800** | | | | | |
| | **RLÚ- úrslit** | **13.107** | **0** | **-93.109** | **94.691** | | **22.940** | | | | | |

Um fyrst verður hugt eftir §7 eru meirútreiðslurnar mettar til 1,6 mió.kr. Hetta skyldast í størstan mun frá minni inntøkum hjá Klaksvíkar Havn. Mett varð, at havnin kom at hava eitt avlop á 4,5 mió.kr. Tað er alt, sum bendir á, at avlopið verður í mesta lagi 3,5 mió.kr. Mett varð eisini eitt avlop á 200 t.kr. hjá Grótbrotinum, men av tí at fleiri tillagingar hava verið við grótbrotinum seinasta árið, verður talan helst um eina útreiðslu á 200 t.kr. Undir §5 sær út til, at inntøkurnar hjá Hallunum eisini verða nakað minni enn mett av tí at býráðið hevur valt at lata ítróttarfeløgum tímar, og so eru eisini hitaútreiðslurar nakað hægri. Undir grein §2 er tað í barnaansingini, tað sær út til, at ov lítið er avsett. Tað er eitt sindur ilt at meta um, hvussu nógv verður brúkt í árinum. Tað hevur drigið eitt sindur út við Fjallafípuni. Mett er ein meirnýtsla á 1,4 mió.kr., men um hildið verður aftur á eitt nú barnaansingfelags, og møguliga øðrum konti, so er møguligt at halda meirnýtsluni væl lægri.

Samanumtikið er neyðugt hjá øllum deildum at halda eitt sindur eftir, so samlaði roknskapurin verður betri.

Samanlagt verður mett, at rakstrarútreiðslurnar verða umleið 202,5 mió.kr. Rakstrarútreiðslurnar íroknað rentustuðul og rentuútreiðslur verða 208,9 mió.kr. Hetta er á sama støði sum 2018.

Á niðanfyri standandi talvu er yvirlit yvir íløgur. Uppruna ætlanin var 66,5 mió.kr. Eykajáttanir eru 93,9 mió.kr. Keypið av veghæddini á Biskupstorgi á 15 mió.kr. er íroknað. Higartil í ár eru brúktar umleið 50 mió. kr. Mett verður, at upphæddin verður 95-100 mió.kr. Seinasta metingin er 96,8 mió.kr.

| | | Íløgur | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Íløgur | Roknsk. | F.ætlan I | Eyka-játtanir | F.ætlan III | Meir/ minni nýtsla | Meting Roknsk. | F.ætlan I | Fram-flytingar | F.ætlan II | | |
| | 1.000 kr | 2018 | 2019 | 2019 | 2019 | 2019 | 2019 | 2020 | 2020 | 2020 | | |
| §1 | Kommunufyristing | 431 | | | 0 | | | | | | | |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 765 | 0 | -3.800 | 3.800 | -3.400 | 400 | | | | | |
| §3 | Børn og ung | 2.108 | 4.000 | -250 | 4.250 | | 4.250 | | | | | |
| §4 | Útbúgving og gransking | 23.322 | 22.700 | -22.300 | 45.000 | | 45.000 | | | | | |
| §5 | Mentan og frítíð | 10.308 | 15.500 | -13.840 | 29.340 | -1.200 | 28.140 | | | | | |
| §6 | Teknisk mál | 40.112 | 22.300 | -49.710 | 72.010 | -55.000 | 17.010 | | | | | |
| §7 | Kommunalt virki | -1.183 | 2.000 | -4.000 | 6.000 | -4.000 | 2.000 | | | | | |
| | **Íløgur tilsamans** | **75.864** | **66.500** | **-93.900** | **160.400** | **-63.600** | **96.800** | | | | | |

Samnumtikið verður mælt til, at fylgjandi kamur verður grundarlag fyri teirri politisku viðgerðini av fíggjarætlanini 2020 hjá Klaksvíkar kommunu.

| Fíggjarkarmur 2020 | |
|---|---|
| **Klaksvíkar kommuna** | **Fíggjar-karmur** |
| **mió.kr.** | **2020** |
| Inntøkur | -288.500 |
| Rakstrarútreiðslur | 206.834 |
| **Rakstraravlop** | **-81.666** |
| Rentustuðul | 3.600 |
| Rentuútreiðslur | 3.400 |
| **Rakstrarútreiðslur í alt** | **213.834** |
| **Rakstrarúrslit** | **-74.666** |
| **Íløgur** | |
| **RLÙ** | |

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Kommunulógin v.m.

**<u>Tilmæli:</u>**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir hetta uppskot sum grundarlag fyri viðgerðini av fíggjarætlan 2020 hjá Klaksvíkar kommunu.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Nevndin mælir til niðanfyri vísta karm fyri fíggjarætlanina fyri 2020 og beinir málið til býráðið og felags nevndarfund (temafund I):

| | Æ2020 (tús.kr.) |
|---|---|
| Inntøkur | 288.500 |
| Rakstur | 203.834 |
| | 84.666 |
| Rentustuðul | 3.600 |
| | 81.066 |
| Rentur | 3.400 |
| Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir | 77.666 |
| Avdráttir | |
| Íløgur | |
| | 77.666 |

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Tilmælið frá FíN 24. sept. 2019 einmælt samtykt.